poltitisk viðmerking

Kompleks tjóðveldismanna

UNDAN fólkatingsvalinum segði Finnbogi Ísakson tjóðveldisfólki, at høvuðsspurningurin í føroyskum politikki var ikki spurningurin um sosialismu ella liberalismu. Nei høvuðsspurningurin var enn sum áður: loysing ella samband. Og vit minnast øll, hvussu tjóðveldisfólk sunnaneftir og norðaneftir fóru at rópa við halleluja-kendari rødd: høvuðsspurningurin er ikki sosialisma ella liberalisma, men loysing ella samband.

VARSKÓ'IÐ hjá Finnboga hevur havt ta avleiðing, at blað Tjóðveldisfloksins — og nógvir politikkarar floksins — einans skriva um tjóðskaparspurningin, meðan øll onnur mál liggja; og tað er ikki løgið, at fólk fregnast eftir støðu Tjóðveldisfloksins til aðrar samfelagsspurningar.

FREMSTUR í hesi »frælsis-skriving« hevur blaðstjórin á 14., Vilmund Jacobsen, verið. Meginparturin av skrivingini hevur snúð seg um ta ódemokratisku heimastýrislógina — tátuna, sum danir smoygdu niður yvir føroyingar móti fólksins vilja fyri 40 árum síðani, og skrivingin hevur endað við eini áheitan á lesararnar um at taka loysingina við Tjóðveldisflokkinum. Vit hava ikki hoyrt eitt orð um ítøkiligar spurningar í hesum sambandi og blaðstjórin skúgvar til viks grundleggjandi spurningin: búskap føroyinga eftir loysingina.

EFTIR okkara tykki er hetta ein so týðandi spurningur, at verður hann ikki umrøddur, og greidliga settur upp, er alt orðaskiftið um loysing í ynskihátti at fyrigykla fólki ein ófullføran veruleika. Javnaðarflokkurin hevur einki imóti at skifta orð um tjóðskaparspurningar, men eftir okkara tykki, og tað heldur meirilutin av føroya fólki eisini, so er framvegis grundarlag at gera tað innan fyri karmarnar, verandi — ella ein broytt — heimastýrislóg setir.

HETTA, tí Javnaðarflokkurin heldur ikki, at heimastýrislógin hevur verið eitt slíkt haft um beinini, sum blaðstjórin á 14. september roynir at prógva við einoygdu skriving síni. Hesi 40 árini, lógin hevur virkað, hevur framburður Føroya — andaliga sum verkliga — verið so stórur sum ongatíð áður, og vanliga føroyinginum er hetta tíðarskeið vunnið livsfrælsi í stóran mun. Ongantíð áður hevur føroyingurin havt tað so gott. Ongatíð hava so nógv fingið høvi at fáa sær útbúgving, velja sær starv, seta seg í búgv undir góðum umstøðum, og njóta tær tænastur, samfelagið hevur at bjóða — hóast nógv framvegis er ófullkomið.

HESIN framburður skal kortini ikki taka burtur tann rætt, Føroya fólk hevur at skifta orð og taka støðu í tjóðskaparspurninginum. Men grundarlagið undir hesum orðaskifti kann ikki bara vera at varta upp við, at fólkið valdi loysing í 1946. Hóast alt liva vit í 1988 og støðan er ikki tann sama sambært øllum valúrslitunum síðani og veljarakanningum. Harafturat kann viðmerkjast, at støðan í 1946 var ørkymlandi, sum fleiri ritgerðir visa, eins og tað var ein ógvuliga lítil og ivasamur meiriluti, sum valdi loysing. Valtekniskt var ein meiriluti fyri loysing, men tað er ikki rætt bara at taka spurningin sum ein valtekniskan spurning, men eisini sum ein søguligan spurning og hyggja eftir, hvat búði aftanfyri.

SOMULEIÐIS er tað ikki rætt, uttan nakað fyrivarni, bara at siga, at danir smoygdu heimastýrislógina yvir føroya fólk. Stutt eftir fólkaatkvøðuna var løgtingsval, tí tað harmiliga hendi, at dana kongur skrivaði út nýval, og valúrslitið má eisini havast í huga, tá spurningurin verður umroddur. Táverandi loysingarmenninir — Fólkaflokkurin saman við tí eina javnaðarmanninum — mistu so dyggiliga meirilutan á løgtingi. Og tað var ein stórur meiriluti á Føroya løgtingi, sum góðtók heimastýrislógina. Tí er tað ikki rætt at siga, t danir smoygdu hana niður yvir Føroya fólk. Lat Óla Breckmann um slíkar reingingar, Vilmund!

HÓAST heimastýrislógin í innihaldi var ein av størstu sigrum javnaðarmanna, so er hon ikki ein heilag lóg. Javnaðarflokkurin hevur verið við til at fylla karmar lógarinnar, sum jú er eitt stig á sjálvbjargingarleið, og vit vilja eisini vera við til at nútímans gera hesa lóg. Hetta er eisini — uttan iva — ynskið hjá javnaðarveljarunum. Sambært kanning, sum studenta- og HF-næmingar gjørdu í 1984, ynskja 61% av javnaðarveljarunum leysari samband. Tað gera eisini 19% av tjóðveldisveljarunum, meðan bara 72% av tjóðveldisveljarunum ynskja loysing! Og taða vit føroysku veljararnar sum heild ynsktu bara sløk 21% loysing. Sløk 31% ynskja samband, meðan stivliga 37% ynskja økt sjálvstýri. Og tað man allarhelst vera tað sum Føroya fólk ynskir. Og ikki bara orðabrask, Vilmund!

-n

Frensur á føstulávint

Fyri nøkrum arum síðan, varð bygdaráðslimur her í bygdini í dulnevndum lesarabrævi lagdur undir at misnýta arbeiði sítt í bygdaráðnum til egið gagn. Ákærurnar vóru so grovar, at skuldsetti var noyddur at fara í bløðini og dokumenterað, at hann ikki hevði borið seg óreiðiliga at.

Fáur her í bygdini mundi ivast í tí, at dulnevnda lesarabrævið var skriva av øðrum bygdaráðslimið, og var orsøkin helst, at skuldsetti bygdaráðslimurin fekk so nógvar atkvøður til bygdarráðsvalið, at listin hjá honum fekk reinan meiriluta.

Í løtuni sær út til, at søgan endurtekur seg her í Sørvági, munurin er bara tann, at nú er tað eitt løgtingsvalevni sum stendur fyri skotið.

Í gjøgnum hesi seinastu árini er tað ferð eftir ferð frá ávísum persónum lopið út í orð, at løgtingsvalevni her í bygdini ikki sjálvur skrivar sínar politisku greinir.

Tey sum hava spunnið hesar illgitingar hava nú helst ásannað, at sørvingar ikki eru so lættir at lumpa, so nú er lagt á annan bógv.

Nú eru tað tey persónligu viðurskiftini hjá umrødda valevni sum verða viðgjørd. Ájú, hesin persónur (persónar) ganga húsagongd, sum frensur á føstulávint og roynur at murra, tí at tíðin er jú knøpp. Tað er heldur ikki nokk hjá hesum persóni, at viðgera alla fortíðina hjá umrødda valevni, og bryggja alt saman til eina súra spiltað suppu. Nei — børnini hjá umrødda valevni skulu eisini dragast uppí hesa rotnu slatrikampagnu. Har verður gitt um arbeiðspláss, barnburðarfarloyvi o.s.fr. o.s.fr.

At tað sum ført verður fram einki hevur við veruleikan at gera, tekur hendan spillandi kelda sær ikki tykni av. Sjálvandi hevur henda miðvísa slatrikampagna eitt endamál, og tað er at oyðileggja so nógv sum møguligt fyri ein persón. Ja —kanska hevur tann ið tey spilla út, fingið ov nógvan vind í seglini.

Ein skuldi næstan trúð, at hetta komandi løgtingsvalið snúði seg um forsetað-sessin í tí »Hvíta húsinum«, tí at her í oynni verða so skitin vápn nýtt, at tað minnir ikki sørt um »Gary Hart« gøluna.

Av øllum vápnum í nýtt verða, er hetta tað mest andstyggiliga, og tí skal mín áheitan til tykkum verða — »latið hampafólk fáa frið, sjálvt um tey hava eina aðra meining enn tit«.

Ein Sørvingur



Haldið **sosialin**

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

hevur fund mikukvøldið 12. oktober kl. 20 á Landsbókasavninum.

Á fundinum fer Eyðfinn Jacobsen, løgfrøðingur, at greiða frá um skattalógina.

Eftir fundin verður valevnisfundur fyri løgtings- og býráðsvalevni floksins.

Nevndin